| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 27. mars 2008 |
| Býráðsfundur nr. | 03/2008 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2008 tann 27. mars kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 19. mars 2008 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen
Gordon M. Petersen, varalimur møttur fyri Jann Toftegaard
Jørmund Lambaa, varalimur møttur fyri Signar á Brúnni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

Jann Toftegaard hevur tann 14. mars 2008 boðað borgarstjóranum frá, at hann verður burturstaddur, og kann tí ikki møta á býráðsfundinum. Hann heitti á borgarstjóran um at innkalla varalim sín Gordon M. Petersen.
Við telduposti, dagfestum 26. mars 2008 kl. 08.44 til FKO boðar Jón Nolsøe Olsen frá, at hann ikki møtir til býráðsfundin uttan grundgevingar.

Signar á Brúnni hevur tann 26. mars 2008 boðað avgreiðslu kommununar telefoniskt frá, at hann ikki møtir á býráðsfundinum av ávísum orsøkum. Hann ynskir at varalimur hansara møtir á fundinum.

Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari varð við á býráðsfundinum undir viðgerðini og avgerðini í máli nr. 11/2008 um roknskap kommununar fyri 2007. John Allan Midjord, mentanar- og menningarleiðari varð eisini við á fundinum.

**Mál nr. 11/2008.**

**Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2007.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 12. mars 2008 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2007 frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, undirskrivaður av Fróða Sivertsen, statsaut. revisor og Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 13. mars 2008 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara post fyri post og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2007 við broytingum (eykajáttanum).

Roknskapurin vísir ein fíggingartørv upp á *kr. 9.512.030,00*.

Sambært høvuðsyvirliti 3 í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdum eykajáttanum í árinum:

| | Kontoheiti: | Roknskapur: | Fíggjarætlan við eykajáttanum | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Byggibúning | -3.050.979,00 | -2.698.000,00 | -352.979,00 |
| 2 | Kommunal virki | 1.839.421,00 | 2.036.000,00 | -196.779,00 |
| 3 | Teknisk mál | -4.851.003,00 | -3.861.000,00 | -990.003,00 |
| 4 | Skúla- og mentamál | -7.582.214,00 | -7.260.862,00 | -321.352,00 |
| 5 | Almanna- og heimsumál | -11.974.500,00 | -11.663.086,00 | -311.414,00 |
| 6 | Umsiting | -4.494.644,00 | -4.346.450,00 | -148.194,00 |
| | **Økið 1-6 tilsamans** | **-30.113.919,00** | **-27.793.198,00** | **2.320.721.00** |
| 7 | Rentukostnaður-netto | -1.776.033,00 | -1.985.975,00 | 209.942,00 |
| | **Økið 1-7 tilsamans** | **-31.889.952,00** | **-29.779.173.,00** | **-2.110.779,00** |
| 1 | Íløgur – studning | -19.459.555,00 | -27.355.000,00 | 7.895.445,00 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Samanteljing** | **-51.349.507,00** | **-57.134.173,00** | **5.784.666,00** |
| 83 | Avdráttir av lánum | -6.489.786,00 | -6.350.000,00 | -139.786,00 |
| | **Samanteljing** | **-57.839.293,00** | **-63.484.173,00** | **5.644.880,00** |
| 86 | Skattainntøkur | 48.327.263,00 | 45.429.976,00 | -2.897.287,00 |
| | **Fíggjartørvur** | **-9.512.030,00** | **-18.054.197,00** | **8.542.167,00** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | Fíggjarbroytingar | -2.487.970,00 | 4.770.000,00 | |
| | Lántøka | 12.000.000,00 | 12.000.000,00 | |
| | **Fíggjarúrslit netto** | **0,00** | **-1.284.197,00** | |

Býráðið hevur annars samtykt eykafíggjarjáttanir fyri tilsamans kr. 7.395.000,00 í árinum, og eru allar hesar fráboðaðar Innlendismálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í løgtingslóg nr. 67 frá 17. mei 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin

Býráðið/fíggjarnevndin er somuleiðis skrivliga kunnað um av fyrisitingini, at ein eykajáttan í flestu førum førir eina útreiðslu við sær, sum beinleiðis ávirkar roknskap kommununar fyri 2007.

*Hesar eykajáttanir verða útgreinaðar á niðanfyri standandi hátt:*

| | **Framdar eykajáttanir:** | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Øki** | **Íløgur framdar í:** | **Upphæddir:** | **Fígging:** | **Endamál:** |
| 1 | Byggibúning | -700.000,00 | Innistandandi | Íløga |
| 2 | Brunaverkið | -200.000,00 | Skattur | Rakstur |
| 2 | Havnabygging | -1.803.000,00 | Flutt millum konti | Íløga |
| 3 | Keyp av gravimaskinu | -2.000.000,00 | Lántøka | Íløga |
| 4 | Skúla- og mentamál | -250.000,00 | Flutt millum konti | Íløga |
| 4 | Skúla- og mentamál | -400.000,00 | Flutt millum konti | Rakstur |
| 4 | Skúla- og mentamál | -850.000,00 | Flutt millum konti | ÍLØGA |
| 5 | Almanna- og heilsumál | -238.000,00 | Skattur | Rakstur |
| 7 | Rentur | -478.000,00 | Skattur | Rakstur |
| 8 | Avdráttir av lánum | -476.000,00 | Skattur | Rakstur |
| | **Tilsamans:** | **7.395.000,00** | **Lántøka/rakstur** | **Íløgur+rakstur** |

Fíggjarnevndin mælir einmæld á fundi 13. mars 2008 býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommunununar fyri 2007 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna roknskap kommununar fyri 2007 uttan viðmerkingar. (8-0).

**<u>Mál nr. 12/2008.</u>**

**Mál viðvíkjandi keypi av lendi við Bøveg.**

Fuglafjarðar kommuna hevur við skrivum, dagfest 01. november 2007 sent eigarunum áheitan um sølu av lendi til útstykking og vegagerð sum framhald av verandi útstykking av niðara parti av Bøvegi.

Heitt varð í skrivunum á eigararnar um at selja kommununi neyðugt lendi fyri kr. 89,00 fyri fermeturin, sum er tann prísur, sum Vinnumálaráðið sambært kunngerð nr. 94 frá 25. oktober 2007 hevur ásett fyri sølu av landsjørð, og sum er tann prísur, sum Búnaðarstovan hevur ásett at galda fyri Fuglafjarðar kommunu, t.v.s. í "Øki 3 – svarandi til størri bygdirnar".

Kommunala fyrisitingin hevur gjørt eina uppseting av svarum frá eigarunum, og vil ein stórur partur selja kommununi lendi fyri kr. 89,00 fyri fermeturin, meðan rættuliga nógvir vilja hava prísin upp á *kr. 110,00* fyri fermeturin, sum tann tann prísur, sum Búnaðarstovan hevur ásett at galda fyri Klaksvíkar- og Runavíkar kommunur, t.v.s. í "Øki 2 – onnur miðstaðarøki".

Samlaða víddin, sum kommunan í fyrsta umfari kemur at keypa frá eigarunum er 11.107 fermetrar og verður keypsprísurin:

fyri 110,00 kr. fyri fermeturin    kr. 1.221.936,00

og fyri 89,00 kr. fyri fermeturin    kr. 1.023.659,00

Sum svarar til ein meirkostnað í keypsprísinum upp á kr. 198.277,00, svarandi til umleið 24%.

Eftir fyriliggjandi eru eigararviðurskiftini í summum førum soleiðis háttað, at neyðugt verður, at eitt nú deyðsbúgv verða uppgjørd, áðrenn eigaraviðurskifti kunnu fara fram, og skeytini avgreitt og tinglýst.

Í tílíkum førum hevði ein ognartøka lætt sera nógv um umsitingarliga arbeiðið.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 10. mars 2008, og mælir nevndin til, soleiðis sum málið er háttað, at prísurin upp á kr. 110,00 fyri fermeturin verður góðtikin, og at hesin meirkostnaður verður lagdur oman á grundstykkini, tá ið hesi verða seld.

Vísandi til truplu eigaraviðurskiftini mælir nevndin somuleiðis til, at kommunan heitir á eigararnar um at góðtaka, at broyting av eigaraviðurskiftunum verða gjørd við eini formligari ognartøku, har eigararnir ikki senda kæru inn til "Kærunevndina í lendismálum" um ognartøkuna.

Á henda hátt kann málið verða avgreitt, eftir at kærufreistin upp á 3 mánaðar frá fráboðanini um ognartøkurnar, er farin.

Tekniska nevndin heitir á fíggjarnevndina um at viðgerða málið.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 13. mars 2008, og mælir einmælt býráðnum at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevndini frá 10. mars 2008.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælunum frá teknisku nevndini og fíggjarnevndini. (8-0).

**<u>Mál nr. 13/2008.</u>**

***Viðvíkjandi eykajáttan (umflyting) "Skúlin íløgur – útbygging/viðlíkahald" til "Nýgerð skúlin framhald skúlapláss".***

Fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá Nevndini fyri uttanumøki skúlans, dagfest 03. mars 2008, har heitt verður á nevndina um at kunna brúka o.u. kr. 125.000,00 av játtanini til uttanumøki skúlans í fíggjarárinum 2008.

Peningurin skal verða nýttur til tilðugrerð av spæliplássinum oman fyri skúlan.

Sambært góðkendu fíggjarætlan kommununar fyri 2008 er eingin peningur avsettur á konto 445010 "Nýgerð framhald av spæliplássi", men eru kr. 1,0 mió. kr. avsettar á konto 445010 "Útbyggingar/projektering". Fyrisitingin metir í hesum føri, at talan er ikki um eina játtan, sum fíggjarnevndin sjálv kann taka støðu til, men at talan heldur er um eina eykajáttan í "Bólki 4" "Skúlin íløgur", sjálvt um talan er um umflyting av peningajáttan.

Fyrisitingin mælir til, um fíggjarnevndin tekur undir við at veita eykajáttan/umflyting, at fíggingin verður útvegað av konto 445010  "Útbygging og projektering av skúlanum", har kr. 1,0 mió eru avsettar og flutt til konto 445010 "Nýgerð framhald skúlapláss".

Sambært góðkendu fíggjarætlanini verður sama kontonummar nýtt bæði til "Útbygging/projektering" og "Nýgerð framhald skúlapláss" , so mett verður helst rættast, at seinna íløgukontoin fær nr. 445011.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga viðgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftan á samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 13. mars 2008, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 125.000,00 til omanfyri nevnda endamál, og at henda verður fíggjað av konto 445010 "Útbygging og projektering av skúlanum".

Nevnda eykajáttan ber ikki eykaútreiðslur við sær fyri kommunukassan, tá ið talan í hesum føri verður um eina umflyting av játtan undir øki 4 "Skúla- og mentamál".

**Avgerð:**
Samtykt varð at beina málið til 2. og endaliga viðgerð á býráðsfundinum 24. apríl 2008. (8-0).

**<u>Mál nr. 14/2008.</u>**

**Umsókn frá Poul Ólason Johannesen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211o.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Poul Ólason Johannesen, dagfest 05. mars 2008 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211o í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 10. mars 2008 og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m2.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av Teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (7 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 15/2008.</u>**

**Viðvíkjandi tilmæli um gerð av øki til standmynd av Victori Danielsen.**

Á fundi í mentamálanevndini tann 14. februar 2008 varð málið um øki til standmynd av Victori Danielsen til umrøðu. Fyri at fáa málið nærri lýst frá ymiskur sjónarhornum hevði nevndin boðsent Regini Jóanesarson, grótlaðara, Jóan Peturi Berg, býargartnara, umframt Pæturi Joensen, og Leif Petersen frá teknisku deild kommununar.

Avtalað varð á hesum fundi, at Regin Jóanesarson og Jóan Petur Berg á komandi fundi í mentamálanevndni skuldu koma við einum ella fleiri uppskotum um, hvussu økið kundi koma at síggja út. Tekniska hjá kundu teir fáa frá Leifi Petersen, byggifrøðingi.

Á fundi í mentamálanevndini hin 21. februar 2008, har omanfyri nevndu luttakarar aftur vórðu savnaðir, vóru fimm uppskpt framløgd, sum øll vóru lutfalsliga lík.

Mentamálanevndin er einmæld samd um, at hjálagda uppskot er tað besta, og mælir tí býráðnum til, at økið verður gjørt sambært hesum uppskoti.

Borgarstjórin tók á býráðsfundi tann 28. februar 2008 avgerð um at taka málið av skránni og beina tað aftur í mentamálanevndina til víðari viðgerðar, grundað á at fleiri upplýsningar eru komnir fram í málinum frá eitt nú standmyndanevndini og listamanninum sjálvum við grundgevingum um aðra plasering á økinum enn sjálvt tilmæli frá nevndini sigur.

Á fundi, sum hildin varð tann 04. mars 2008 millum umboð fyri mentamálanevndina og standmyndanevndina, grundgav Jóhan Heri Joensen fyri tilmælinum hjá standmyndanevndina, sum annars eru at lesa í hjáløgdu fundarfrásøgn frá 04. mars 2008.

Á fundi í mentamálanevndini, sum hildin varð tann 11. mars 2008 varð omanfyri nevnda fundarfrásøgnin løgd fram, somuleiðis sum nýggju upplýsningarnir vórðu havdar við í eini samanlíkning av uppskotunum frá standmyndanevndini og mentamálanevndini.

Eftir viðgerðina er støðan hjá mentamálanevndini í málinum óbroytt, og heldur nevndin sostatt fast við sítt tilmæli frá 22. februar 2008.

**Avgerð:**

Tórfríður Abrahamsen setti fram fyrispurning um ikki Eyðun á Lakjuni varð ógjegnigur, grundað á at býráðslimurin er abbasonur hansara. Atkvøtt varð um habilitetsspurningin, og varð 1 atkvøða fyri, at Eyðun varð ógjegnigur, meðan 6 atkvøður vórðu ímóti. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Elisabeth D. Eldevig, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Jørmund Lambaa. Eyðun varð ikki á fundinum, tá ið henda atkvøðugreiðsla fór fram, men kom inn á fundin beint eftir avgerðina.

Býráðið samtykti eina millumloysn millum bæði uppskotini frá mentamálanevndini og standmyndanevndini. Henda millumloysn ber við sær, at standmyndin verður flutt nakað niðan í niðara niveau, soleiðis at hon ikki kemur at standa so árend fyri, sum í uppskotinum frá standmyndanevndini. Tó kann eisini verða góðtikið, um at standmyndin verður sett á einum trini hægri enn verandi niveau. (7 atkv. fyri og 1 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**Mál nr. 16/2008.**

**Skriv frá SP/F Bedingini í Fuglafirði um lendiskeyp.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá SP/F Bedingini í Fuglafirði, dagfest 04. mars 2008 um keyp av lendi burtur av matr. nr. 239a hjá kommununi til samanleggingar við matr. nr. 317a hjá bedingini.

SP/F Bedingin er ikki nøgd við svarskriv kommununar, dagfest 09. mars 2007 og heitir á teknisku nevndina um at taka málið upp aftur og viðgera uppruna umsóknina, so svar kann koma upp á hesa.

Hetta mál hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 01. mars 2007, har samtykt varð, at tann partur av matr. nr. 239a, sum skal verða lagdur saman við matr. nr. 317a og 317b fær egið matr. nr., og verður lendið selt undir somu treytum sum grundstykkir frá kommununi, soleiðis at bygt skal verða innan 2 ár, annars fellur stykkið aftur til kommununa móti, at keypsprísurin verður endurgoldin.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. mars 2008, og mælir nevndin býráðnum til, at uppruna umsóknin verður gingin á møti, soleiðis at teir umleið 93 fermetrarnir burtur av matr. nr. 239a, sum eru skraveraðir á hjálagda korti, verða lagdir saman við matr. nr. 317a.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (6 atkv. fyri og 2 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Jørmund Lambaa og Tórfríður Abrahamsen).

**Mál nr. 17/2008.**

**Skriv frá Firma Kato um lendiskeyp.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Firma Kato, dagfest 04. mars 2008 um keyp av lendi burtur av matr. nr. 239a hjá kommununi til samanleggingar við matr. nr. 317b.

Firma Kato er ikki nøgd við svarskriv kommununar, dagfest 09. mars 2007 og heitir á teknisku nevndina um at taka málið upp aftur og viðgera uppruna umsóknina, so svar kann koma upp á hesa.

Hetta mál hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 01. mars 2007, har samtykt varð, at tann partur av matr. nr. 239a, sum skal verða lagdur saman við matr. nr. 317a og 317b fær egið matr. nr., og verður lendið selt undir somu treytum sum grundstykkir frá kommununi, soleiðis at bygt skal verða innan 2 ár, annars fellur stykkið aftur til kommununa móti, at keypsprísurin verður endurgoldin.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. mars 2008, og mælir nevndin býráðnum til, at uppruna umsóknin verður gingin á møti, soleiðis at 230 fermetrar burtur av matr. nr. 239a, sum eru skraveraðir á hjálagda korti, verða lagdir saman við matr. nr. 317b.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (6 atkv. fyri og 2 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Jørmund Lambaa og Tórfríður Abrahamsen).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.30.

Dánjal Vang

Elisabeth D. Eldevig

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Tórfríður Abrahamsen

Gordon M. Petersen

Jørmund Lambaa

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen